




*Niðara loysnin er tann vegaføringin sum leirvíkingar ynskja – bæði bygdarfólkið og bygdarráðið*

# Vegurin skal verða liðugur komandi ár

**Týsdagin segði fólkið í Leirvík sína hugsan um, hvørja vegaføring ið tey ynskja gjøgnum bygdina. Fríggjadagin staðfesti bygdarráðið úrslitið**

VEGAFØRING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Leirvík:** Við 60 prosentum fyri niðaru loysnini, var eingin ivi um at leirvíkingar ynskja vegin niðri í bygdini.

Eftir greiða úrslitið av fólkaatkvøðuni skuldi bygdarráðið staðfesta úrslitið.

Við Sosialin mikudagin segði borgarstjórin, Fríðgerð Heinesen at ætlanin var at kalla bygdarráðið saman fríggjadagin at staðfesta úrslitið.

Og á fundi seinnapartin henda dagin var hetta eitt av trimum málum á skránni.

## Einmælt

Á fundinum, sum byrjaði klokkan 15, vóru fyrst tvey onnur mál til viðgerðar – ein umsókn frá J+H um asfaltering av Leirvíksvegnum frammanfyri betongsblandistøðina og eitt tilboð um at mála kommunuskrivstovuna uttan.

Triðja og seinasta málið var staðfestingin av úrslitinum. Her varð gjørt púra greitt frá bygdarráðsins síðu, at nú skal altso nakað henda:

- Í staðfesting av úrslitinum heitir bygdarráðið á landsins myndugleikar um beinanvegin at gera vegin ígjøgnum Leirvík, verður sagt stutt og greitt.

Lagt verður, líka so avgjørt aftrat, at alt arbeiðið skal verða liðugt komandi ár.

Víst verður á, at bygdarráðið heldur fast í kravinum um eina íbinding í kommunala vegin sunnanfyri bygdina, so tætt við tunnilsmunnan sum ferðslunormarnir loyva tí.

Ikki óvæntað var henda samtyktin einmæld.

# Nú roynist snellan væl



*Nú er meiri at fáa hjá snellubátunum av Sandi*

*Mynd: bkv.fo*

Fríggjadagin og leygardagin vóru snellubátarnir av Sandi í Sandshavinum, og fingu teir eitt sindur av fiski, skrivar heimasíðan bkv.fo.

Bátarnir lógu úr 400 upp í 600 pund.

Teir siga annars frá, at teir sóu ikki nógvan fugl í Sandshavinum, men inni við land var hinvegin nógvur fuglur at síggja.

- Tað sær heldur betri út nú, verður sagt frá einum av bátunum.

**sb.**

